# … Byggilist sum útflutningsvinna

uttanlanda. Einki er til hindurs fyri, at uppgávan kundi verið loyst av føroyskum virkjum í felag, ella at byggiharri seinni reisti krav um at loysa uppgávuna í felag við útlendskan ráðgevara. Vandin at krevja hetta, áðrenn vinnarin av kappingini er funnin, er, at talan skjótt verður um strámannavirksemi, sum ikki veruliga mennir føroysku ráðgevaravinnuna. Í Føroyum eru vit í tí hepnu støðu, at vit hava nógv sera dugnalig starvsfólk í arkitektavinnuni. Tað er umráðandi, at vit varðveita hesi fólk í vinnuni og kunnu bjóða teimum spennandi uppgávur og avbjóðingar. Eins og aðrar vinnur ynskja vit at fáa tey, sum starvast uttanlanda heimaftur at geva íblástur og at menna vinnuna uppaftur meira. Um hetta verður leisturin framyvir, koma vit heilt víst at síggja eina vinnu, sum ikki mennir seg, tí allar tær týðandi uppgávurnar fara av landinum.

Soleiðis er støðan í Grønlandi, við tí úrsliti, at arkitektavinnan ikki er á tí støði, sum hon er her heima. Spurningurin til tann almennu byggiharrarnar, land og kommunur, kundi tí verið: Ynskja tit grønlendskar tilstandir?

### Fólk, førleiki og vitanarvinna til Føroyar

Tað skal havast í huga, at tann útlendski marknaðurin hevur havt uppgangstíðir í longri tíð og hetta skapar ein mismun í tilvísingum um fakligar royndir og vinnulig avrik.

Arktektavinnan er ein vinna, sum er vælegnað sum útflutningsvinna, Finnland bygdi til dømis allan sín spírandi altjóða samleika á arkitektur og listahandverk.

Um tann føroyska vinnan ikki kann fáa tær heimligu tilvísingarnar t.v.s eina almenna bygdar- og góðskubygging her heima við føroyskum ráðgevum, sum muna nakað, koma vit ongantíð út í heim. Føroyingar hava ein samleika, eina føroyska byggilist, sum vit skulu menna og dagføra sum t.d gjørt við randarhúsunum á Gøtu. Byggilist kann verða partur av tí útflutningsvinnuni, ið skal stuðla fiskivinnuni, nakað sum vit í stóran mun mangla, um búskapurin skal gerast meira støðugur.

### Tað krevst serkunnleiki at byggja í Føroyum

Arkitektavinnan er ein liberal vinna, sum er í støðugari kapping. Vinnan er sera viðbrekin yvir fyri sveiggjum í búskapinum. Arkitektavinnan er ein vitanarvinna, har tað er umráðandi at hava kontinuitet og at varðveita vitanina í landinum og støðugt menna hana. Tað krevst serkunnleiki at byggja í Føroyum, tí veður og vindur seta sera stór krøv til arkitektoniskar og byggiteknískar loysnir. Henda serkunnleikan hava vit. Tað er hinvegin einki krav í lýsingunum at hava bygt í Føroyum, hetta undrar okkum stórliga!

### Kapping á jøvnum føti

Um hesin áður nevndi háttur at bjóða ráðgevaravirksemi út hevur til endamáls at fáa útlendskar fyritøkur inn á føroyska marknaðin, fer føroyska arkitektavinnan fyri so vítt ikki at leggja seg út í hetta. Føroysk arkitektavirkir eru dagliga í kapping við føroysk og útlendsk virkir og soleiðis hevur tað altíð verið. Hesum hava føroysk virkir einki ímóti, bara tað verður kappast á jøvnum føti. Tað er ikki støðan í hesum føri! Aðrir hættir eru at fáa kapping og kvalifiserað aftursvar uppá upppgávurnar. Hví ikki bjóða arbeiðini út sum opnar hugskotskappingar, projektkappingar ella innbodnar kappingar, har føroyskar teknistovur sleppa at luttaka? Síðan kann almenni byggiharrin seta krøv um orku og førleika, men tá hevur teknistovan, sum vann uppgávuna fyrimunin og ikki bert "tann størsta teknistovan".

### Varðveiting av gomlum bygningum

Vit venda okkum síðan til spurningin um varðveiting av gomlum húsum, sum hevur vaksandi áhuga millum føroyingar. Hvat heldur tú um varðveiting av gomlum húsum og gomlum býlingum? Hvussu hava vit megnað at sameina gamalt og nýtt?

Kontan á fíggjarlógini, Friðað hús og fornminni, ið verður umsitin av Føroya Fornminnissavni, hevur ov lítla játtan, uml. kr. 600.000, til at kunna røkka sína uppgávu sambært lógini. Játtanin er til umvæling, viðlíkahald og rakstur av friðaðum landsognum, sum eru álagdar Fornminnissavninum at reka, at samsýna Fornminnisnevndini, umframt stuðul til friða hús og fornminni, sum ikki eru landsogn. Savnið hevur skyldu at ráðgeva eigarum av friðaðum bygningum í sambandi við umvæling og viðlíkahald. Eisini hevur savnið skyldu til at sýna friðaðar bygningar fimta hvørt ár. Tað eru uml. 90 bygningafriðingar tilsamans. Nógvar av friðingum fevna um fleiri bygningar, soleiðis at talið kemur uppum 100, umframt øll úthúsini, ið eru afturat bygningunum. Til allar hesar bygningarnar verða vanliga bert umleið Kr. 140.000,- latnar í studningi, meira røkkur játtanin ikki til. So her liggur nógv á láni.

### Alment stevnumið fyri byggilist

Tit hava í Arkitektafelagnum gjørt vart við, at byggilistin eins og aðrar listagreinir eigur at verða ein partur av landsins mentanarpolitikki – hvørji ráð hava tú og felag títt til avvarandi myndugleikar við atliti at byggilist og mentanarpolitikki?

Landsstýrið eigur at orða eitt alment stevnumið í sambandi við byggilist. Tað er ein royndur lutur, at eitt bygningsverk ofta kann standa í fleiri hundrað ár. Hesin veruleiki undirstrikar tørvin á "burðardygd" í planlegging, proportiónum, tilfarsvali, litavali o. s.fr. ella stutt sagt byggilist.

Vit hava fyri stóran part okkara samleika í tí fysiska umhvørvinum, náttúruni og í tí menniskjaskapta, sum vit flyta okkum í. Býir og bygdir, bygningar, landslag og býarinnbúgv, t.v.s. okkara nærumhvørvi, hava alstóran týdning, tí trivnaður er nær knýttur at byggilistini ella fagurfrøðini. Gera vit okkum ikki ómak við hesum, kunnu vit gera okkum sjálvum og komandi ættarligum óbótaligan skaða. Tað er umráðandi, at tað almenna er forsprákari og ein fyrimynd fyri øll onnur. Stevnumiðið má vera, at ein íløga í bygningsverk er væl umhugsað, eitt ískoyti til umhvørvið, og ikki eitt úrslit av tilvildarligum stuttskygdum loysnum, sum bert taka støði í tíð og kostnaði, men eisini í byggilistarligari dygd. Eitt orðað mentanarpolitiskt stevnumið fyri byggilist, sum ásetur, hvussu farast skal fram viðvíkjandi bygging, hevði havt við sær betri úrslit og sæð yvir eitt longri tíðarskeið verið ein sera góð íløga. Hetta hevði nevniliga eisini minkað um framtíðar útreiðslur av framdari bygging, tí minni íløgur skulu gerast í viðlíkahald og umsiting. Tað er almenn vitan innan byggivinnuna, hvat krevst fyri at fremja eina góða bygging, trupulleikin er tíverri ofta at lopið verður uppum, har garðurin er lægstur, hetta kundi ein landsbyggireglugerð hjálpt uppá.

### Landsbyggireglugerð

Reglur eru fyri, hvussu bygging skal fyriskipast og hvussu bygningar skulu innrættast. Hesar eru t.d. lógir, kunngerðir og reglur fyri at tryggja fólk og bygningar viðvíkjandi eldsvanda, konstruktiónum, arbeiðsviðurskiftum, ferðslu inni og úti og orkunýtslu. Í grannalondum okkara er lógarverkið samlað í eitt felags "bygningsreglement", men í Føroyum er enn eingin bygningsreglugerð. Brunaumsjón Landsins hevur heimild at gera kunngerðir um brunaverju og brunatrygd. Arbeiðseftirlitið hevur heimild at gera kunngerðir um arbeiðsviðurskiftir. Umsiting av býarplanum og byggisamtyktum er hjá kommunala eftirlitinum í Innlendismálaráðnum. Almanna- og Heilsumálaráðið arbeiðir við reglum um viðurskifti hjá rørslutarnaðum. Tað eru, sum sagt, fleiri stovnar, sum gera reglur í hvør sínum lagi, sum ikki altíð eru samskipaðar. Kommunurnar skulu byggimálsviðgera eftir hesum ofta fløktu reglum uttan altíð at hava fakfólk til at røkja hesa uppgávu. Rættast hevði verið at savan alt lógar- og regluverkið í eina fyrisitingareind, soleiðis at øll viðurskiftir vóru samskipað og staðfest varð, hvør hevði myndugleikan. Tað áliggur Landsverki at fáa til vega eina landsbyggireglugerð, sum samansjóðar almennar reglur um bygging í Føroyum. Hetta arbeiði eigur ongantíð ov skjótt verða sett í gongd.

### Almenna rúmið

*Hvørji arkitektonisk krøv setur ein arkitektur í dag til almenna rúmið?*

Hvat almenna rúminum viðvíkur, so eru tað ikki bert bygningarnir, men eisini rúmið millum bygningarnar, sum er av alstórum týdningi fyri trivnaðið. Tað, sum er umráðandi at hava í huga í hesum sambandi, er millum annað, hvussu ferðsla, nýtsla og uppihald skulu skipast- fólk og bilar skulu sameinast.

Um tú gongur ein túr út á Tinganes fært tú kensluna av, hvussu rætta skipanin av útirúmum kann skapa eitt umhvørvi, ið er framúrskarandi - sjálvt um veður og vindur ikki er til vildar, kann ein altið finna lívd og trivnað.

Tórshavnar kommuna ger nú aftur eina roynd at broyta miðbýin við umskipan av ferðsluni, nýggjum innbúgvi og áleggingum - hetta hevur nevniliga sera stóran týdning um tað skal eydnast at fáa fólk at nýta býarrúmini.

### Tey góðu húsini

At enda Mayfinn Norðoy: Hvørji krøv skulu eftir tíni fakliga áskoðan eini góð sethús, ein góð íbúð og ein góður almennur bygningur lúka?

Nú tali eg fyri meg sjálvan: Eg havi starvast á privatari teknistovu, Føroya Fornminnissavni og seinni á Landsverk. Seinasta árið havi eg bygt upp eina teknistovu, nevnd Kontrast arkitektar í samstarvi við Heina Weihe, ið er designari. Okkara mál er at skapa vøkur og vælvirkandi fysisk umhvørvið – frá planlegging av bygningum til innrætting og sniðgeving. Tann einstaka byggiskráin og virðini á staðnum er íblásturin. Vit vilja framleiða tað serliga í hvørjari verkætlan, so hugskotið verður varðveitt. Kreativitetur, professionalisma, sjálvstøða og dynamikkur hjá starvsfólkinum er mest umráðandi tilfeingið á teknistovuni. Visjónin hjá Kontrast arkitektum er at byggilistini betri kor. Okkara arbeiði snýr seg ikki bert um byggingina, men eisini um ábyrgd fyri tí sosiala, umhvørvinum, fíggjarviðurskifti, byggitilgongdini o.s.fr. Fyri at gera mun ynskja vit, at byggiharri, brúkarar og aðrir ráðgevar luttaka so tíðliga sum møguligt í tilgongdini. Uppgávurnar verða altíð gjørdar í tøttum samstarvi við byggiharran og brúkaran. Okkara stevnumið er at skilja og tulka ynskini hjá brúkaranum, og at umseta hesar til loysnir, í samskipan og tráð við staðið har byggjast skal. Sum navni vísur á, er tað kontrastin millum tað lætta og tað tunga, tað opna og tað lokaða, tað høga og tað lága o.s.fr. sum er okkara virkisevni og miðil til at skapa spennandi rúm og upplivilsir, sigur Mayfinn Norðoy at enda í samrøðuni við blaðið.

Δ



*Tað er almenn vitan innan byggivinnuna, hvat krevst fyri at fremja eina góða bygging, trupulleikin er tíverri ofta at lopið verður uppum, har garðurin er lægstur, hett kundi ein landsbyggireglugerð hjálpt uppá, sigur Mayfinn Norðoy*